Scansat/TV 3

Leygardagur 10. november

7.00 **Flipper**
7.30 **Duckula greivi**
7.55 **Klovnurin Bozo**
8.00 **Rags to Riches**
15.30 **Waco & Rhinehart**
17.05 **Star Kids**
17.30 **Tíðindi**
17.33 **A-Team**
18.25 **Videoaction**
18.35 **The Young Riders**



Tá ið Kid kemur til Shaugnessys støðina, er hon niðurbrend og øll familjan Shaugnessy er myrd. Tað tykist sum tey seku eru indiánarar, sum krógva seg nærhendis. Tá ið Kid ber eyga á ein ungan indiánara, tekur hann hann, og tekur hann við til Sweetwater. Men á vegnum verða teir tiknir av nøkrum indiánarum, sum taka báðar til fanga.

19.30 **Lát kameran gá**
20.00 **Tíðindi**
20.03 **Heimurin hjá Billy**
21.30 **The Brotherhodd of Satan**
Amerikanskur ræðufilmur frá 1971. Ben er bilferð við dóttir síni Kiti og gentuni Nicky, tá ið stormur brestur á. Tað eydnast teimum umsiðir at koma til ein lítlan by, har tey gista. Dagin eftir hendir teimum ein onnur vanlukka, og tey mugu verða verandi. Tey fara at hyggja nærri at býnum. Har hendir okkurt undarligt, og nógv børn eru horvin. So hvørvur Kiti...
23.10 **Twilight Zone**
23.40 **Liðugt**

Sunnudagur 11. november

7.00 **Rip, Rap og Rup**
7.25 **Three Stooges**
7.30 **Lassie**
8.00 **Fødd til frælsi - Leyvinnan Elsa**
13.00 **Ítróttur**
17.30 **Tíðindi**
17.33 **Kapital**
18.30 **Golden Girls**
Vinur Blanche, listamaðurin Laszio, hevur biðið hana vera modell hjá honum til næstu standmyndina, og tað vil Blanche fegin. Men tekningarnar, hann ger aðrenn, eru ikki vakrar, og tá dámar henni einki...
19.00 **The Legend of Tarzan, Lord of The Apes**
21.30 **Tíðindi**
21.33 **Tenns: Specialturnering í Milano**
Eitt orð á vegnum

Mánadagur 12. november

16.00 **Barnasending við Skurt -Duckcula greivi**
16.30 **Lassie**
17.00 **Chip og Chap, privatdetektivar**
17.30 **Rip, Rap og Rup**
17.55 **Tíðindi**
18.00 **Eydnuhjólið**
18.30 **Grannarnir**
19.00 **Spenser**
Spenser sær ein brotsmann royna at myrða eina skøkju, Lydiu. Hann fer aftan á honum, maðurin verður handtikin og koyrdur á politistøðina. Skjótt kemur sakførari hansara, og tað er gamli vinmaðurin hjá Spenser, Bruce Taylor. Og hetta málið fær persónligar avleiðingar fyri sambandið millum Spenser og Bruce Taylor.
20.00 **Tíðindi**
20.03 **Bronco Billy**
Amerikanskur action-filmur frá 1980 við Clint Eastwood í høvuðsleiklutinum sum Bronco Billy McCoy. Hann hevur sjálvur valt seg út til at vera við í einum »wild western« showi, og hini eru m.a. indiánarahøvdingin Big Eagle.
22.10 **Tíðindi**
22.13 **The last Place on Earth**
23.10 **Oh, Madeline!**
23.35 **Tíðindi**
23.38 **Liðugt**

Sjónvarp Føroya

Leygardagur 20. november

14.00 **Amerikanskar fyrimyndir 1:8 (ut)**
14.50 **Menn**
15.15 **Bakur**
15.45 **Klár til upptøku**
16.15 **Undirhald**
17.25 **Rockur**
18.05 **Dýrafilmur**



Svin verður tosað nógv um, tá talan er um nýmótans føðslu-idnað. Men um vit sleppa svínum út í náttúruna, skikka tey sær eins og forfedrar teirra. Vit skulu siggja svín og hvussu tey liva, og kendi rithøvundurin Astrid Lindgren sigur sína hugsan um evnið. Steen Yssing hevur lagt til rættis.

19.00 **Okkara løta**
20.00 **Grannar okkara**
20.30 **Framløgusending Javnaðarfloksins**
20.40 **Spurt og svarað** -Javnaðarflokkurin
21.10 **San Antonio** - am. western
22.55 **Eystursjógvurin** - 6:6
23.25 **Dirch Passer**



Sjónleikarin og skemtarin Dirch Passer doyði fyri 10 árum síðani, og í hesum sambandi sýnir DR nøkur kut úr filmum hansara og øðrum sjónvarpssendingum. Og vit skulu hoyra starvsfelagar, vinfólk o.o., sum kendu Dirch, greiða frá.

0.10 **Liðugt**

Sunnudagur 11. november

14.00 **(e)**
14.40 **Umberto D** - it. filmur
16.05 **Gudstænasta**
17.15 **Revurin** - opera
Opera í 3 aktum eftir Leos Janacek.
Lítli revur: Djina Mai-Mai. Hann-revurin: Bent Norup. Kona hansara: Kirsten Buhl-Møller. Lærarin: Ticho Parly. Presturin: Carl Chr. Rasmussen. Harasta: Lars Waage. Verturin: Erik Harbo.
19.00 **Rosannie**
19.30 **Cosby og tey**
19.55 **Skái**
20.30 **Framløgusending Sjálvstýrisfloksins**
20.40 **Spurt og svarað** -Sjálvstýrisflokkurin
21.10 **Á húsagang** - 6:6
22.00 **Andakt**
22.10 **Konur — 10 ár seinni** -no. filmur
Norskur filmur frá 1985. Triggjar kvinnur hittast fyri aðru ferð í einari skúlaveitslu og tær verða væl.
Kaja: Katja Medbøe. Mie: Anne Marie Ottersen. Heidrun: Frøydis Armand.
23.35 **Liðugt**

Mánadagur 12. november

19.30 **Cosby og tey**
19.55 **Sunnur matur**
Nógv verður sagt um, hvat er sunt og hvat ikki er sunt. Henda sendingin snýr seg eisini um hvat er sunt, ein vinbóndi, ein bóndakona og ein bilmekanikari siga sína hugsan.
20.30 **Framløgusending Sambandsfloksins**
20.40 **Spurt og svarað** -Sambandsflokkurin
21.10 **Tikarin**
22.05 **Góða Sára** - írskur filmur
Hetta er írskur sjónvarpsleikur frá 1990. Í 1974 doyðu seks fólk, tá ið IRA bumbaði eina ølstovu nærhendis London, og Gerard Conlon varð handtikin.
Leikurin byggir á brøvini millum hann og trúgvu konu hansara, Sáru. Hon bardist fyri at prógva, at hann var ósekur.
23.25 **Liðugt**

Útvarp Føroya

Fastar sendingar gerandisdagar:
7.15 **Veðurtíðindi og tíðindi**
7.18 **Morgunlestur**
7.30 **Veðurtíðindi og tíðindi**
7.35 **Góðan morgun Føroyar**
8.00 **Veðurtíðindi og tíðindi**
8.05 **Góðan morgun Føroyar - framhald**
9.00 **Veðurtíðindi og tíðindi**
9.05 **Morgunlestur**
9.15 **Fyri tey smáu**
10.00 **Veðurtíðindi og tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan**
10.10 **Lurtararnir og vit**
11.00 **Tíðindi**
11.30 **Undir døgurða/Sjómansvísur**
12.00 **Tíðindi**
12.01 **Middagstónleikur**
12.15 **Veður og valuti**
12.20 **Tíðindi og kunngerðir**
12.35 **Døgurðatónar**
13.00 **Veðurtíðindi**
13.01 **Nýtt og gott gamalt**
14.00 **Veðurtíðindi**
— — —
17.00 **Veðurtíðindi og tíðindi**
18.30 **Veðurtíðindi, tíðindi og aktuelt**
21.00 **Veðurtíðindi og tíðindi**

Leygardagur 10. november

8.05 **Millum átta og níggju** - Marner Andreasen velur løgini
9.30 **Barnaútvarpið** (e)
11.01 **Orðabókin** (e)
13.01 **Vikan ið fer**
14.00 **»Havið - mitt heim og mín verð«** (e)
15.00 **Menuettin**
16.00 **Frítíð og ítriv** (e)
16.30 **Úr trúarheiminum** (e)
17.30 **Politisk framløgusending: Tjóðveldisflokkurin**
18.30 **Veðurtíðindi og tíðindi**
18.45 **V4-dráttur**
18.50 **Í Andgletti** - Finnbogi Ísakson úr tjóðveldisflokkinum svarar spurningum frá útvarpsfólki
19.20 **Telefon til tjóðveldisflokkin** - Finnbogi Ísakson svarar spurningum frá veljarunum
20.00 **Tuggan**
21.00 **Dagsins poppur**
21.50 **Halgan stundar til**
22.00 **Veðurt. og tíðindi**

Sunnudagur 11. november

10.00 **Veður og tíðindi**
10.05 **Barnaútvarpið**
10.30 **Sunnumorgun**
11.00 **Skilnaðargudstænasta fyri Ejvind Vilhem, varabiskupi, í Havnar kirkju. Ejvind Vilhelm prædikar**



12.10 **Middagskonsert**
Í middagskonsertini hoyra vit eina av teimum kendu violinkonsertunum frá 1800-talinum, konsertina, sum Tschaikovsky skrivaði í 1878, og sum hann upprunaliga ognaði violinspælaranum Leopold Auer, sum tó einki líktist á hana, — segði, at tað ikk læt seg gera at spæla hana. Hon var óspælilig, segði hann. Tschaikovsky ognaði tí í staðin russisk-jødiska violinspælaranum Adolph Brudsky konsertina, og hann frumspældi hana í Wien 4. desember 1881 saman við orkestri, sum Hans Richter stjórnaði.
12.45 **Døgurðatónar**
13.10 **»Skaldskapurin, vakurleikin og veruleikin«** - Fyri fyrilestur hjá Turið Sigurðsdóttir
13.40 **»Ljómar fagrir, fróir«**
Tað er ein ómetaliga stórur og virðismikil gripur, sum er at finna í øllum teimum sangløgunum, sum komu fram í Týskalandi í fyrru helvt av 19. øld. Av tónaskaldum frá teirri tíðini eigur fyrst og fremst at verða nevndur Franz Schubert, sum jú komponeraði í hundraðvís av sangløgum, og heldur ikki eiga at verða gloymdir Robert Schumann og Mendelssohn.
Ein annar, sum setti løg til nógvar sangir í hesum tiðarskeiðinum, var Friedrich Silcher, sum livdi frá 1789 til 1860. Eini 250 løg liggja eftir hann, fleiri av teimum væl kend, til dømis »Muss i denn« og »Jetzt gang i ans Brünnele«.
Sangsendingin í útvarpinum sunnudagin umfatar sjey av sangløgunum hjá Friedrich Silcher. Hetta eru upptøkur við einum týskum manskóri, »Männerchör Teisendorf«.
14.00 **Veðurtíðindi og tíðindi**
14.10 **Kvøðuljómar**
16.00 **»Havið - mitt heim og mín verð«**
Hetta er seinna sending, har Samuelina Hansen hittir Andrias Poulsen, ættaður av Nesi í Vági, men búsitandi í Suðurlandi.
Andrias sigur frá starvi síni í danskari koffardisigling undir seinna heimsbardaga, har mangar ferðir var hónum vátt undir fótum. Hann førdi skip øll krigsárini og sjey ár eftir bardagalok — sama skip frá 1939 til 1952.
Teir vórðu raktir av bæði minum og bumbum, og fleiri ferðir varð Andrias sjálvur hóttur við livinum. »Eg bleiv trúaður við at bliva skotin fleiri ferðir«, tekur hann sjálvur til, og so leggur hann stillisliga afturat: »men tað gekk yvir alikavæl!«
Andrias var eisini aktivur fakfelagsmaður — í longri tiðarskeið nevndarlimur, fyrst í danska stýrimannafelagnum og seinni í skiparafelagnum. Hann gavst at sigla 76 ára gamal.
Í dag býr Andrias Poulsen, ið nú er 91 ára gamal, á Suðursælandi, har hann til denna dag hevur verið við í ymiskum felagslívi, m.a. í fólkadansi, svimjing, pensionistafealg o.ø.
16.45 **Poppkvørnin**
17.30 **Politisk framløgusending: Sosialistiski Loysingarflokkurin**
18.30 **Veðurtíðindi og tíðindi**
18.40 **Ítróttatíðindi**
18.50 **Í Andgletti** - Dánjal Jákup Jacobsen úr Sosialistiska Loysingarflokkinum svarar spurningum frá útvarpsfólki
19.20 **Telefon til Sosialistiska Loysingarflokkin** - Dánjal Jákup Jacobsen svarar spurningum frá veljarunum
20.00 **Tíðindi á grønlendskum**
20.15 **Veðurtíðindi**

Mánadagur 12. november

9.30 **Skaldskapurin, vakurleikin og veruleikin** (e)
11.01 **Undir døgurða**
17.05 **Lýð á ljóðið**
17.30 **Politisk framløgusending: Sambandsflokkurin**
18.30 **Tíðindi og aktuelt**
18.50 **Í Andgletti** - Edmund Joensen úr sambandsflokkinum svarar spurningum frá útvarpsfólki
19.20 **Telefon til sambandsflokkin** - Edmund Joensen svarar spurningum frá veljarunum
20.00 **Feðgar á Ferð** - 8. partur
20.30 **Gospelløtan**

Barnaútvarpið

Jólini nærkast

Barnaútvarpið fer hvønn morgun í desember mánað at láta eina lúku upp í jólakalendaranum, sum Oscar Hermansen hevur teknað. Vit skulu hoyra meira um henda jólakalendaran í Barnaútvarpinum í komandi viku.

Í vikuni fer Barnaútvarpið undir eina nýggja spurnarkapping. Hesa ferð snýr tað seg um fisk. Nakrir upplýsingar verða givnir, og síðani kunnu børn gita, hvønn fisk talan er um og senda svarið til Barnaútvarpið.

Í komandi viku verða tað pedagognæmingarnir, sum gera sendingarnar um morgnarnar »Fyri tey smáu«.